# Villmenn í jólahýri



**Villmenn verða í rættuligum jólahýri, tá ið teir spæla til dans í SÍF húsinum leygarkvøldið. Teir fara at geva gávupakkar til penasta jólamannin og penastu jólakonuna hetta kvøldið. Eisini fær tann mest eggjandi nissan ein pakka afturfyri**

DANSUR

Leygarkvøldið verður dansur í SÍF-húsinum í Sandavági. Bólkurin Villmenn úr Vágum fara at spæla.

Fyri at fáa jólahýrin í topp, fáa tveir av dansarunum á gólvinum eisini ein pakka til at bøta fyri teirra sveittamiss. Fyri at vinna hesa kappingina skal ein vera í allarbesta jólahýri, og prógva tað á dansigólvinum. Villmenn fara síðani at døma, hvør ið hevur gjørt sær størsta ómakin við hesum. Hvat, ið fjalir seg í hesum jólapakkunum, fæst ikki at vita, fyrr enn teir eru pakkaðir upp. Tí tað er ikki loyvt at snýta við tílíkum.

Tónleikurin, ið verður spældur hetta kvøldið, er ein blanding av góðum dansitónleiki. Helst verður eisini nakað av jólatónleiki at hoyra frá Villmonnum. Villmenn góvu fløguna »Feikleikans ringrás« út í vár, og hava síðani spælt til dans av og á. Tónleikararnir í bólkinum eru allir rættuliga royndir, og spæla teir sera fjøltáttaðan tónleik.

Tað verður lagt rættuliga nógv fyri, fyri at fáa dansin so jólaliga sum gjørlig. Tey, sum koma í dans ílatin nissuklæðir, fáa atgongumerkjaprísinum.

Yvirskotið av dansinum fer til at stuðla rakstrinum av ungdómshúsinum í Sandavági. Her hittast ungdómar úr Vágunum um kvøldarnar og hugna sær á ymiskan hátt. Hóast at ungdómshúsið í Sandavági er rættuliga nýtt, so er hetta ikki tað fyrsta tiltakið, ið tey skipa fyri. Tá ið ungdómshúsið lat upp fyri kortum, var skipað fyri einum sera hugnaligun kvøldið við tónleiki. Tey, ið standa á odda fyri virkseminum í ungdómshúsinum, vilja heita á øll um at koma í dans hetta kvøldið, so at jólahýrurin kann koma í topp.

## VEÐRIÐ



**Veðrið í dag**
Andøvsgul til stívt andøvsgul ella hvassan vind útnyrðingi, sum minkar niður í andøvsgul. Skýggjað við ælaveðri, kanska við heklingi, hitin millum 1 og 5 stig. Um kvøldið veksur vindurin til strúkur í vindi av suðuri og landsynningi. Tað fer at regna og hitin veksur til millum 4 og 7 stig.




**Hósdagin**
Væntandi skrið av útsynningi og vesturi, 15 – 20 m/s, sum fer í ein útnyrðing og lækkar. Tað verður klárari veður við ælingi, ið seinni um dagin kann verða heklingur ella kavi. Hitin fellir til millum 1 og 4 stig.

**Fríggjadagin**
Hann makar vindin av ymsum ættum, undir 8 m/s, skiftandi veður við heklingi ella kavaælingi og hitin millum 1 og 4 stig. Seinni veksur hann vindin upp til hvassan vind. Tað verður eitt sindur lýggjari við regni ella ælaveðri.

**Leygardagin**
Upp í hvassan vind av vesturi, ið fer í ein útnyrðing og lækkar til gul. Skiftandi skýloft og ælingur, partvís sum heklingur ella kavi. Hitini millum 1 og 5 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -17 |
| Nuuk | -6 |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 5 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -7 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | -1 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 12 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 14 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í dag**
Eitt lágtrýst vestan fyri Ísland fer í ein landnyrðing. Í nátt fer eitt djúpt lágtrýst fram við Føroyum í ein útnyrðing við nógvum vindi, regni og seinni við ælaveðri.



**Í morgin**
Eitt lágtrýst fer fram við norðan fyri Føroyar hósdagin. Leygardagin kemur eitt nýtt lágtrýst hendanvegin

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/12 kl. 06[00]–13/12. 06[00]. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,8 mm – mált frá 12/12 kl. 06[00]–13/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 92,2 mm

## V4-dráttur

**í drátti nr. 1567**
**11.des. 2004**

**Tølini:** 7-10-12-17-19-34-36-39-58-59-63-72-74-86-88-96

### Vinnararnir eru:

Snars. nr. 2659628 (Farseðil)
Snars. nr. 2917974 (Statoilst. í Vági)

### Eykavinningar:

Snars. nr. 2864556 (Shellst. við Norðara Ringveg)
Snars. nr. 2888298 (Klaksvík)
Snars. nr. 2897401 (Klaksvík)
Snars. nr. 2937469 (Shellstøðin við Streymin)
Snars. nr. 2953077 (Shellstøðin í Klaksvík)

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

11. desember: Mánin næstur jørðini
12. desember: Tendring
18. desember: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. des | 09.23 | 21.52 | 08.23 | 20.52 | 08.38 | 21.07 | 11.23 | 23.52 | — | 12.23 | 07.38 | 20.07 |
| 16. des | 10.17 | 22.42 | 09.17 | 21.42 | 09.32 | 21.57 | — | 12.17 | 00.52 | 13.17 | 08.32 | 20.57 |
| 17. des | 11.05 | 23.29 | 10.05 | 22.29 | 10.20 | 22.44 | 00.42 | 13.05 | 01.42 | 14.05 | 09.20 | 21.44 |
| 18. des | — | 12.04 | 11.04 | 23.40 | 11.19 | 23.55 | 01.29 | 14.04 | 02.29 | 15.04 | 10.19 | 22.55 |
| 19. des | 00.40 | 13.15 | — | 12.15 | — | 12.30 | 02.40 | 15.15 | 03.40 | 16.15 | 11.30 | — |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. des | 06.38 | 19.07 | 09.38 | 22.07 | 10.38 | 23.07 | 09.08 | 21.37 | 10.23 | 22.52 |
| 16. des | 07.32 | 19.57 | 10.32 | 22.57 | 11.32 | 23.57 | 10.02 | 22.27 | 11.17 | 23.42 |
| 17. des | 08.20 | 20.44 | 11.20 | 23.44 | — | 12.20 | 10.50 | 23.14 | — | 12.05 |
| 18. des | 09.19 | 21.55 | — | 12.19 | 00.44 | 13.19 | 11.49 | — | 00.29 | 13.04 |
| 19. des | 10.30 | 23.05 | 00.55 | 13.30 | 01.55 | 14.30 | 00.25 | 13.00 | 01.40 | 14.15 |

5 707265 100036 >